# Jesuspápi og hansara minstu

## Um tvídráttin millum kristindóm og politikk

**Viðmerking**



**Hanus Kamban**



Hans Andrias Djurhuus lýsti sína kristnifatan í grein í Tingakrossi í januar 1913

Sosialurin

### I. Niðursetandi umrøða

### Jesuspápi

Tá ið vit børn vóru úti og spældu, og tað vildi so til, at vit reikaðu langt burtur av alfaravegi, kanska út um bøgarðarnar, ella niðan móti vøtnunum, og so skýmingin legðist, tá kundi onkur angist, vit ikki altíð fataðu, brádliga seta at hjartanum. "Tá skalt tú biðja Jesuspápa vera hjá tær," hevði mamma sagt. Og tað gjørdi eg, og tað hjálpti. Men tann allarfyrsta hugmyndin var komin nógv fyrr, við einum sangi, sum mamma sang, tá vit fóru til songar:

*Góða mamma, eg vil sova,*
*eygu míni møðast brátt,*
*Jesus pápi hevur lovað*
*meg at verja væl í nátt.*

Tíðir broytast. Í dag er hetta navnið – Jesus – at hoyra og síggja, hvar tú gongur, og hvar tú ert staddur, í útvarpi, sjónvarpi, á plakatum, á skeltum, í bussum, á jakkauppsløgum, í bilum. Og tú spyrt teg sjálvan, hvat endamálið er við hesum áhaldandi streyminum av orðum, sum ongan neyvan tanka innihalda, sum eingi krøv seta, og sum einki tykjast at hava við religión ella moral, í orðsins sanna og djúpa týdningi, at gera.

Er endamálið kanska at krógva tann sanna og veruliga boðskapin, at gera eina lívssjón - sum er virðismikil og álvarsom - bíliga, kravlítla og ómakaleysa? Yrkjarin Hans Andrias Djurhuus setti henda spurning fram, í eini grein í *Tingakrossi* í januar 1913, og kom til júst hetta úrslit. Tá ið hann so skuldi siga sína egnu hugsan um, hvat sannur kristindómur er, tók hann m.a. fram hesi orðini:

*Vilt tú vera fullkomin, tá far og sel alla ogn tína og gev teimum fátæku, og tú skalt eiga dýran grip í himli.*

### Hini minstu

Greinin hjá Hans Andriasi rann mær í huga, nú eitt rǽttiliga sakleyst lógaruppskot førdi til ikki sørt av øsing bæði í bløðunum og á okkara háttvirda tingi. Talan var ikki á nakran hátt um at skerja talufrælsið, hvørki hjá leikum ella lærdum, men um – sum seg sømir einum og hvørjum demokratiskum samfelag – at verja minnilutar móti óndsinnaðari jagstran.

Kanska kundi eg, áðrenn eg fari víðari, loyvt mær stutt at vent aftur til barnaárini. Tá ið mamma tosaði um Jesuspápa, tók hon ofta serliga fram eitt hugtak, sum hon rópti "hini minstu". Og eg tori næstan at siga, at hetta hugtakið var tað, sum vigaði mest í *hennara* kristnifatan. Og tað var týðiligt, at *hini minstu* vóru ikki bara børnini, men - *the underdog* - øll, sum av onkrari grund vóru í eini sperdari støðu, við undirlutan ella í neyð, ung, gomul, kvinnur, menn, tað bangna barnið, tann særdi hermaðurin, tann píndi fangin, kríatúr, fuglur og fiskur.

Og tað var greitt, at Jesuspápi var umboð fyri hesi minstu, og at tann gerð, góð ella ring, sum bleiv gjørd ímóti teimum, varð samstundis gjørd ímóti Jesuspápa.

Her komu so tveir harrar, sum at kalla støðugt bera Jesuspápa í sínum skildri. Og tað, sum hjá teimum var um at gera, var, at teir vildu hava rætt at brúka tempul og bønhús og tann halga talararapallin til at tosa "niðursetandi" um sín næsta. Ein merkilig trongd, at vilja spenna tað heilaga fyri sín egna illvilja móti sínum granna og næsta, og at brúka prædikustól og bønhús – ikki til religiøs endamál – men til at forpesta tilveruna hjá øðrum menniskjum, sum eru góðir borgarar, halda lógina og gera sína skyldu.

### Jim Kerr

Lat meg straks viðganga, at eg føldi meg ikki sørt raktan av hesum merkiligu útsøgnum frá okkara gudsmonnum, ikki tí at eg sjálvur eri samkyndur, men tí at eg havi vinir, sum eru tað. Og ein av mínum heilt góðu vinum var skotin Jim Kerr, sum eina aprílnátt fyri tveimum árum síðani bleiv álopin í býnum Perth av trimum monnum, sum ivaleyst hildu upp á tann heilaga rættin at hava "niðursetandi" hugsan um sín næsta.

Ein teirra setti fót fyri Jim, so hann datt, og hinir báðir sparkaðu hann, annar teirra so leingi og so dyggiliga, at tá teir fóru, lá hann á vegnum sum ein bløðandi klútur. Hann doyði nakrar tímar seinni. Um Jim var samkyndur, veit eg ikki, men eingin ivi er um, at tað var homofobi – niðursetandi hugsan um tey homoseksuellu - sum dreiv hesar harrar.

Nú kann verða spurt: Hvat hevur hetta við málið at gera? Svarið er einfalt, greitt og eintýtt. Frá søguni vita vit, at ónd orð elva til ónda gerð. Í norrønum máli hava vit enntá eitt orð fyri hesum – "ráðbanin" er hann, sum, við at birta upp undir, fær aðrar at fremja ta ringu gerðina, í versta føri morð.

Líkasum ágangur móti jødum í tvey túsund ár m.a. er ein frukt av óteljandi prædikum í óteljandi katólskum og lutherskum bønhúsum, er ágangur móti samkyndum, og sostatt eisini morðið á Jim Kerr, m.a. ein frukt av "niðursetandi" umrøðu, í bløðum, bókum, á vegamótum, undir neystum og av prædikustólum og talarapallum í samkomum.

### Orsøk og fylgja

Tað er mær púra greitt, at ikki øll, sum av eitt nú samkomupallum umrøða sín næsta "niðursetandi", ætla honum ta lagnu, sum mín vinur Jim Kerr fekk. Hetta er tó líka mikið. Sambandið millum orsøk og fylgju verður standandi, og eisini tann, sum heldur sína niðursetandi umrøðu vera part av onkrari halgari hugsjón, má taka ábyrgd.

Men tann avgerandi spurningurin er sjálvsagt, á hvønn hátt Jesuspápi kemur inn í myndina. Og aftur er svarið greitt og eintýtt. Ein veikur, klantrasligur maður, sum liggur og bløðir burtur á vegnum, sparkaður í lepar, uttan tað stað, sum hann "kann halla høvur sítt" at – er hann ikki ein av Harrans minstu – og teir, sum fremja ágang ímóti honum, annaðhvørt sum gerningsmenn ella sum ráðbanar, fremja teir ikki í roynd og veru ágang móti Kristusi sjálvum?

Tað kenst merkiligt, at ein syndari sum undirritaði skal noyðast at bera fram eina so sjálvsagda útsøgn sum hesa – í einum landi, har ein næstan ikki fær gingið fyri "sakkønum". Men kanska er tað ein áminning um, at hesin floymurin av gudiligum orðagosi í stóran mun (um ikki altíð) – umframt, sum nú tykist meira og meira týðiligt, at ota, so isi, eina heila tjóð niður í eitt díki av ómentan, smakkloysi og óupplýsing – hevur til